## Mentamálaráðið
*Vinnu- og Miðnámsskúladeildin*

# Stjóri

**til nýggjan stovn, ið fevnir um samanlegging av Føroya Sjómansskúla og Maskinmeistaraskúlanum**

Nú landsstýrismaðurin í Mentamálum hevur gjørt av at leggja Føroya Sjómansskúla og Maskinmeistaraskúlan saman til ein stovn, er eitt sera áhugavert og fjølbroytt starv sum stjóri leyst at søkja. Stjórin skal virka fyri, at samanleggingin av skúlunum í ein stovn verður framd í verki á ein so skilagóðan hátt sum til ber. Harumframt skal stjórin standa á odda fyri øllum undirvísingarvirksemi og allari menning, ið fer fram á stovninum.

**Høvuðsuppgávur stjórans eru, at:**
- fremja bygnaðarbroytingar á Føroya Sjómansskúla og Maskinmeistaraskúlanum,
- hava námsfrøðiligu og umsitingarligu leiðsluna á stovninum,
- tryggja at fíggjarligi raksturin á stovninum verður so skilagóður sum tilber,
- fremja samstarv við vinnulívið o.o., ið varða av økinum,
- menna stovnin til ein føroyskan vitanardepil innan sítt serøki
- umboða stovnin úteftir

Stjórin hevur ábyrgdina av dagligu leiðsluni og menningini av stovninum og teimum útbúgvingum, ið eru og koma á økinum. Stjórin skal tryggja, at nevndu uppgávur verða loystar á einum høgum fakligum støði, og at bygnaður og mannagongdir eru í samsvari við nútímans krøv.

**Førleikakrøv:**
Vit vænta okkum, at umsøkjararnir hava:
- viðkomandi útbúgving frá lærdum háskúla
- leiðsluroyndir frá tí almenna ella privata arbeiðsmarknaðinum
- góð leiðslu- og samstarvsevni, umframt mennandi leiðslustíl
- førleika at menna samstarvið við myndugleikar, vinnulívið og aðrar áhugabólkar
- vilja og evni at royna nýggjar leiðir
- førleika at orða seg væl á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- áhuga fyri avbjóðingum

Føroya Sjómansskúli og Maskinmeistaraskúlin skulu alsamt mennast í samsvari við altjóða krøv, og verður tú sjálv/-ur í stóran mun við til at skapa starvið.

Starvið er spennandi við skiftandi uppgávum við nógvum samskifti inn- og úteftir, umframt uttanlandssamstarvi.

Arbeiðið er á einum høgum fakligum støði og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður lønt ájavnt 37. lønarflokki eftir sáttmálanum hjá tænastumonnum, umframt eftirløn, tó uttan at vera tænastumannastarv. Lønin er í løtuni kr. 38.577,99. (1. oktober 2004 kr. 39.928,22). Talan kann møguliga verða um, at starvið verður áramálssett, t.d. í 5 ár, við einum lønarískoyti upp til 20 %.

**Umsókn:**
Umsókn við prógvum, c.v. o.ø. skulu sendast til:

**Mentamálaráðið**
Hoyvíksvegur 72
Postsmoga 3279
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi 28. juni 2004 kl. 16.00. Starvið verður sett frá 1. august 2004 ella eftir nærri avtalu.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Eyðbjørn Poulsen, deildarstjóra í Mentamálaráðnum á tlf. 305050 ella 355075. Allar umsóknir og møguligir fyrispurningar um starvið verða viðgjørd í trúnaði.

*__Føroya Sjómansskúli__ hevur til uppgávu at veita undirvísing til skipara og skipsføraraútbúgvingina. Á skúlanum eru 19 fólk í føstum starvi. Næmingatalið er umleið 90 í løtuni. Skúlin hevur eina skeiðsdeild, sum fyri tað mesta tekur sær av at eftirútbúgva skipsyvirmenn.*
*__Maskinmeistaraskúlin__ hevur til uppgávu at veita undirvísing til maskinist- og maskinmeistaraútbúgving. Á skúlanum eru 16 fólk í føstum starvi. Næmingatalið er uml. 70 í løtuni. Føroya Brandskúli er lagdur inn undir Maskinmeistaraskúlan. Báðir skúlarnir hava altjóða góðkenning frá IMO felagsskapinum sum útbúgvingarstovnar innan síni serøki.*

Visti tú ikki tað? Sosialurin

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Snarskivan

Snarskivan er avgreiðslan hjá Tórshavnar kommunu

Deildin er bindilið millum borgaran og tær tríggjar fyrisitingarnar: Miðfyrisitingina, Teknisku fyrisitingina og Trivnaðarfyrisitingina.

Arbeiðsøkið, ið Snarskivan røkir, er tænasta í breiðari merking til starvsfólk og borgara.

Snarskivan heldur til í snotiligum hølum í miðbýnum í Havn. Avgreiðslan er saman við postverkinum í gamla posthúsinum

www.torshavn.fo

## Samskiftisstarvsfólk til Snarskivuna

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir starvsfólki til samskiftisøkið í Snarskivuni.

**Tað er tær vit leita eftir, um tú**
- kanst arbeiða sjálvstøðugt og taka ábyrgd av minni og størri verkætlanum
- hevur hegni at bera fram kunnandi tilfar innanhýsis og í fjølmiðlunum
- hevur royndir við at nýta web tøkni sum kunningaramboð
- hevur góðan førleika í føroyskum

**Uppgávurnar á samskiftisøkinum í Snarskivuni**
Uppgávan verður at taka hond um samskiftið innanhýsis og úteftir, tað merkir:
- skipa fyri neyðugum tíðindaflutningi til borgaran, fjølmiðlarnar og kunningarstovur
- skipa fyri og hava ábyrgd av nýgerð og dagføring av faldarum
- uppsetan av lýsingum og kunnandi tilfari við myndatalvum
- hava ábyrgd av nær- og fjarneti, kunngerðartalvum og kundaskíggjum

**Setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv og verður sett 1. august ella eftir nærri avtalu. Lønin verður sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Ynskir tú at vita meira**
so set teg í samband við Mourits Mouritsson, deildarleiðara, ella Niels Una Dam samskiftisstarvsfólk.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Tórshavnar kommunu, postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 28. juni 2004. Viðmerk á umsóknina "Samskiftisstarvsfólk"

## Kunngerð um broyting av ALS-gjaldinum

Við heimild í 9, stk. 3, í løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, við seinni broytingum, hevur stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina fyrisett:

**§ 1.** Tað í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, § 9, stk. 1, nevnda ALS-gjald er 1,00 %.

**§ 2.** Henda kunngerð fær gildi frá 1. juli 2004. Samstundis fer úr gildi kunngerð um broyting av ALS-gjaldinum, dagfest 2. juli 2003.

Stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina, 17. juni 2004

Karin Kjølbro (sign.) forkvinna

/ Elisabeth O. Gaardbo (sign.)

*ALS hevur til endamáls at veita fíggjarligan stuðul til arbeiðsleys, at virka fyri bøttum møguleikum hjá arbeiðsleysum at fáa arbeiði og at umsita arbeiðsávísing fyri føroyska arbeiðsmarknaðin. Á ALS starvast í løtuni 18 fólk. Virksemið hjá ALS er í høvuðsheitum lógarásett. Ovastu leiðsluna hevur stýrið fyri ALS, sum - eftir tilmæli frá arbeiðsgevara- og løntakarafeløgunum á arbeiðsmarknaðinum - verður valt av Føroya Landsstýri.*

ALS
Arbeiðsloysisskipanin
P.O. Box 3022 · FO-110 Tórshavn
Tlf. 34 95 50 · Fax. 34 95 51
als@als.fo · www.als.fo

Minnist til haldaragjaldið av Føroya besta blaði...!!!
– seinasti rættstundis gjaldsdagur er 28. juni 2004
Argjavegur 26 · tel 34 18 00 · fax 34 18 01 · e-mail: post@sosialurin.fo
Sosialurin

# Stór hús til sølu



Um hóskandi boð fæst seljast vælhildin hús á Gróthúsvegi 10 í Hoyvík. Húsini eru uml. 270 fermetrar og standa í friðarligum umhvørvi við sera góðum og vøkrum útsýni.

Ovasta hæddin: Altan við útsýni yvir allan fjørðin. Stór gongd, køkur, stova, 2 rúm og wc.

Miðhæddin: Gongd/høll, baðirúm, 3 stór kømur, tað eina við bað/wc og tað eina við lítlum køki og duri.

Kjallarin undur jørð: Innrættaður við verkstaði, vaskirúmi, arbeiðsrúmi og gongd.

Grundøkið 1000 fermetrar. 2 bilpláss. Urtagarðurin hevur jarðarmun, bygdur upp í terrassum við grótlaðing. Nógvar blómur, runnar og trøð. Somuleiðis hjallur og 2 úthús.

Áhugaður keypari er vælkomin at ringja

**tlf. 316510 ella punta@post.olivant.fo**

# Hús í Hoyvík



Við hesum verður sethúsaognin Kristiansgøta 40, 188 Hoyvík, lýst til sølu, um hóskandi boð fæst.

Grundøkið, matr. 1 tp, Hoyvík, er 536 m².
Húsini eru í einari hædd á 137 m2 við lágari reising.

Húsini eru innrættað soleiðis:
Gangur, køkur, vaskirúm, baðirúm, 2 kømur, hjúnarúm við wc/brúsu og stór stova. Trappa er upp á loftið, kamar og rúm úti á lofti er gjørt í fjør. Pláss er fyri einum kamari afturat.

Húsini eru bygd í 1990, takið er skift fyri 2 árum síðani. Ventilatión er í húsinum.
Stórt bilhús er á grundøkinum.
Húsini standa í friðarligum og barnavinarligum umhvørvi ovast á Løgmannabreyt.

Nærri upplýsingar um ognina fáast frá undirritaðu.

**Advokatskrivstovuna**
Fr. Petersensgøtu 9
100 Tórshavn · Tlf. 311145
Fríða Patursson, adv.
teldupostur: frp@jura.fo

# Hús í Vestmanna til sølu



Húsini eru í tveimum hæddum og standa sera væl fyri, mitt í bygdini, við góðum útsýni. Til húsini hoyra hjallur og bilhús.

Verða seld um hóskandi boð fæst.

**Meira fæst at vita á tlf. 424380**

Sosialurin
-tað loysir seg

# Skrivstovuhølir

til leigu í miðbýnum – 170 fermetrar.

**Tlf. 315438**

# Hús í Trongisvági til sølu



Húsini eru nýliga umvæld úr fyrsta floks vøru.

Skulu síggjast. Minsti prísur 450.000 kr.

**Ring 37 24 65**

i
Sosialurin





## TIL SØLU

Um hóskandi boð fæst, eru eini raðhús í Havn til sølu.

Húsini eru nýliga ístand gjørd.

Húsini eru 130m², 65m² hvør hæddin, umframt altan og hjall.

Í neðra er inngongd, 3 kømur, baðirúm og vaskirúm.

Í erva er køkur, stova og 1 kamar.

Eisini er møguleiki fyri at innrætta loftið. Húsini liggja í friðarligum, barnavinarligum umhvørvi, og hava gott útsýnið.

**Áhugaði kunnu ringja á tel 510490**

# Íbúð á Argjum til leigu

frá 1. juli – 3 kømur, køkur, stova, bað + kjallari.

Verður leigað saman ella sum 3 kømur.

1 mðr. depositum.

**Sosialurin**
box 76
110 Tórshavn

**Bill.mrk. 1120**